

www.oljan.fo

**Jan Müller** 15 - 08 - 2012

# Irak næststørsta framleiðaralandið í OPEC

Irak framleiðir nú 3,2 milliónir tunnur av olju um dagin, og so stór hevur framleiðslan ikki verið tey seinastu 20 árini. Hetta ger samstundis landið til tann næststørsta framleiðaran í OPEC-felagsskapinum. Bara Saudiarabia er størri. -Framleiðslan er nú størri enn í londum sum Iran, Sameindu Arabisku Emiratunum og Kuwait, sigur irakski varaorkumálaráðharrin, Hussein al-Shahristani. Ein stórur partur av tí irakska oljuútbúnaðinum fór illa undir innrásini og borgarakrígnum aftaná, men tey seinastu árini hava myndugleikarnir í Bagdad brúkt nógva orku uppá at fáa gongd á oljuframleiðsluna og at fáa vinnuna aftur á føtur ásannandi, at meginparturin av inntøkunum hjá ríkiskassanum koma frá oljuútflutninginum. Sambært upplýsingum frá OPEC var framleiðslan í Irak knappliga 3,1 milliónir tunnur um dagin í síðsta mánað, og sostatt er tann dagliga framleiðslan økt 400.000 tunnur síðani á nýggjárinum. Øvugt í Iran Í sama tíðarskeiði er dagliga framleiðslan í grannalandinum Iran minkað 700.000 tunnur og var í síðsta mánað 2,8 milliónir tunnur um dagin, og greinarar siga, at munurin millum tey bæði londini verður uppaftur størri í komandi árum. Stjórnin í Bagdad hevur latið útlendsk oljufeløg sleppa fram at sínum keldum, og málið er, at framleiðslan skal koma upp á 3,5 milliónir tunnur um dagin innan árslok. Av hesum er ætlanin at útflyta 2,6 milliónir tunnur dagliga. Kanningar higartil hava staðfest, at Irak hevur 143 milliardir tunnur av olju í síni undirgrund umframt eina ovurstóra nøgd av gassi, skrivar NTB.